# 106-ára gamalt akker uppaftur á yvirflatuna

**Eitt lið av kavarum var mikudagin og kavaði við Søtuvík á Sandoynni. Ørindini vóru at fáa hendur á einum akkerið, sum hevur ligið á havsins botni í 106 ár**

LEITAN
*Heri á Rógvi*

Tað var í 1895, at týska skipið S/S Principia stevndi til lovaða landið fyri vestan. Á veg til USA gekk leiðin framvið Føroyum. Ólukkutíð so hendi ein spreinging í fýrrúminum, soleiðis manningin mátti flýggja fram í stavn á skipinum. Har sat manningin so í einar tvær vikur, áðrenn skipið endaði sínar dagar og sakk við Søltuvík á Sandoynni. Í fyrsta atløgu sluppu tríggir við lívinum, men skjótt var bert ein av hesum á lívi.



*Toni Dam er fegin um at gamla akkerið er komið til høldar. Tað var tó ikki bara sum at siga tað at fáa hendur á akkerinum, sigur hann.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hann rak fyri vág og vind á opnum havi liggjandi á einari lastalúka, sum hann nýtti sum flaka. Hann hevur rikið norðureftir við streyminum fram við Koltri og suður aftur um Heystfjørð, og endin var, at hann varð funnin av bóndanum í Kirkjubø. Tað sigst, at tá bóndin kom á mannin, so mátti hann kalla bróta hann leysa frá lúkanum, tá hendur hansara vóru so fastlæstar.

Tað eydnaðist bóndanum og øðrum í Kirkjubø at fáa lív aftur í mannin við at fjálga um hann, og eftir eina tíð kom hann fyri seg aftur. Hann steðgaðI í Kirkjubø eina tíð, áðrenn hann legði leiðina aftur til Týsklands.

Í Týsklandi var ikki hann væl móttikin, og fleiri morðroyndir vórðu framdar móti honum. Orsøkin til hetta var, at skipið var tryggjað sum um, at tað var lastað við gulli. Hetta visti maðurin, men eigararnir av skipinum vildu verja síni áhugamál.

Maðurin vitjaði tó aftur í Kirkjubø. Tey, sum hava vitjað í Kirkjubø kenna óivað alt til søguna, tá lastalúkan, sum maðurin nýtti sum flaka, enn verður nýtt sum borðpláta í Kirkjubø.

### Ævintýr

Søgan um Principia hevur verið kend í Føroyum í nógv ár. Tað eru nógv ár síðani, at tað varð staðfest hvar skipið lá.

Ein av teimum, sum eisini gjørdist hugtikin av søguni er Toni Dam úr Havn. Toni er sjálvur kavari, og hann hann helt hetta vera so mikið spennandi, at hann skipaðI fyri at fáa hendur á akkerunum hjá skipinum. Tað er nemliga soleiðis, at orsaka av spreingingini og øðrum, so er ikki nógv eftir av skipinum, men akkerini eru tó at finna.

Eisini onnur hava víst akkerinum áhuga, m.a. borgarstjórin á Sandi.

Í juni mánaði fóru teir fyrsta túrin niður eftir einum akkeri. Støðan er nemliga tann, at skipið hevði trý akker umborð, tá tað sakk. Toni sigur, at hetta við at hava trý akker var vanligt.

Mikudagin var so farið niður aftur. Akkerini lógu á 35 metra dýpi. Tað var tó heldur eingin hissini uppgávu, sum bíðaði teimum. Bæði akkerini sótu rimmarføst. So mikið føst, at neyðugt var at spreingja tey leys. Við serkønari vitan eydnaðist tað teimum at spreingja tað eina akkerið leyst. Teir varnaðust, at hitt akkerið var so mikið illa farið, soleiðis at tær valdu at lata tað liggja eftir.

Akkerið varð hála upp og siglt til Havnar, har tað varð tikið upp á land.

### Alt sjálvboðið

Við á ferðini henda mikudagin vóru 13 kavarar. Toni sigur, at alt arbeiðIð varð gjørt sjálvboðið. Tað krevur heldur ikki lítið at fara undir eina tílíka verkætlan. Eitt nú spreingingin kravdi nógv arbeiðI og servitan. Eisini skuldi fólkið siglast aftur og fram, eins og tað stóra og tunga akkerið skuldi fáast til Havnar.

Kavaraliðið vórðu tó væl stuðlaðir av CC Johansen, Tórshavnar Skipasmiðju og Dragaberg.

- Tað, at alt verður gjørt sjálvboðið er eisini tað sum ger verkætlina spennandi, sigur Toni Dam.

Toni sigur eisini, at hann hevði eitt sera gott lið av kavarum við sær, og hesir hava eisini verið virknir kavarar í nógv ár, summir í heili 35 ár. Uttan góðar kavarar hevðI tað ikki borið til at gjørt hetta, sigur Toni.

Toni ætlar tó ikki at gevast á hondum. Fleiri verkætlanir standa fyri framman, m.a. skipið úr søgnini um Rannvu, sum sakk við Skúvoynna, heldur Toni kundi verið ein spennandi verkætlan.

Sum nú er liggur tað gott 3 tons tunga akkerið uttanfyri Marinustøðina í Havn. Ætlanin er eisini, at akkerið framyvir skal eiga eitt pláss á Marinustøðini.

## Óla Jákup Rólantsson givin á Rás 2



*Óla Jákup Rólantsson verður ikki at hoyra á Rás 2 framyvir, tá hann hevur sagt seg úr starvi*

**Kendi útvarpsverturin hjá Rás 2 hevur sagt seg úr starvi. Sendingarnar halda tó fram sum áður, sigur stjórin, Petur Jacobsen**

UPPSØGN
*Heri á Rógvi*

Rás 2 hevur seinastu tíðina støðugt víðkað um sítt virksemi við fleiri sendarum kring landið. Eisini tykist tað at vera politiskur vilji at geva Rás 2 betri karmar at virka undir.

Støðan hjá Rás 2 er eisini tann, at teir í løtuni vanta tvey starvsfólk Orsøkin er nemliga tann, at Óla Jákup Rólantsson og Leila Jacobsen bæðI eru farin úr starvi.

Stjórin fyri Rás 2 váttar, at Óla Jákup Rólantsson og Leila Jacobsen bæði eru farin úr starvi.

- Òla Jákup Rólantsson og Leila Jacobsen arbeiðI ikki longur hjá Rás 2. Óla Jákup hevur sjálvur sagt seg úr starvi, sigur Petur Jacobsen, stjóri.

Tá spurt verður eftir orsøkini til uppsagnirnar veit stjórin ikki reiðiliga at siga okkum, hvør orsøkin er. Petur Jacobsen sigur, at Óla Jákup Rólantsson sjálvur hevur sagt seg úr starvi, og talan er ikki um, at hann er uppsagdur.

Petur Jacobsen sigur, at roynt verður at halda fram sum áður. Fyribils verður tað Petur sjálvur og Sonne Smith, sum fara at taka um endan, sigur Petur.

Eitt nú fer Sonne Smith at taka sær av kendur ferðslusendingini, Breytin, sum Óla Jákup Rólantsson hevur tikið sær av áður.

Petur Jacobsen sigur, at teir framvegis hava gott mót, og hetta fer ikki at ávirka vanligu gongdina hjá Rás 2 nakað munandi.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Óla Jákup Rólantsson.



# Mugu brynja okkum við toli

**- Vit mugu brynja okkum við toli. Vit eiga eitt sera stórt øki, og tað skuldi verið løgið, um tað ikki onkra staðni finst olja, sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP, sum viðgongur, at boringin miseydnaðist men at tað kortini nú er prógvað, at her er ein virkin oljuskipan**



*Hjarnar Djurhuus her saman við enskum BP umboði í ferð við at fáa nógva útbjóðingartilfarið inn um gáttina í Oljumálastýrinum*

*Mynd jan*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Fyrsta oljuboringin hjá BP og Shell á føroyska landgrunninum gjørdist eitt vónbrot – í hvussu er fyri tey mongu, sum høvdu roknað við, at veruligt oljufund fór at verða gjørt. Hóast sannlíki fyri at finna olju var 42% undan boring, so vunnu tey 58% . Olja varð funnin men langt frá í nóg stórum nøgdum til at fara undir eina lønandi framleiðslu.

Føroyski stjórin hjá BP, Hjarnar Djurhuus dylur ikki fyri, at hann er vónsvikin, men hann hevur tó so langt frá mist alla vón.
- Vit mugu brynja okkum við toli. Vit eiga eitt stórt øki. Tað skuldi verið løgið, um tað ikki onkra staðni fanst olja. Nú er tað so prógvað, at her er ein virkin oljuskipan.

Hann leggur aftrat, at orsøkin til at tú ikki finnur størri nøgdir av olju – í hvussu so er ikki í BP brunninum – er tann, at tú manglar eitt dekklag ella loft, sum oljan kann savnast undir. Hetta er ein avgerandi fortreyt fyri at finna nógva olju.

Tá oljuspor verða staðfest kundi hent, at har vórðu nøgdir til at framleiða, men tá einki er, sum heldur uppá oljuna og forðar henni at hvørva, so er hon spakuliga likin út. Tað takið, dekklagið sum kann sammetast við eitt regnhjól var ikki til steðar í Svínoyarbrunninum. Tað er so eingin, sum sigur, at hetta nýtist at verða støðan aðrastaðni í føroyska økinum. Men tá tað ikki ber til við seismikkinum at síggja, hvar dekkløg, har oljan kann savna seg, finnast, so er ómøguligt at gera sær nakra greiða niðurstøðu um hetta.

BP hevði tvey mál borað varð eftir. Teir møttu sama trupulleika í báðum. Loftið - dekklagið manglaði. Men tað varð tó staðgest, at tilfarið, sum borað varð ígjøgnum, er tað sama sum vestan fyri Hetland. Og enn eitt positivt tekin: oljugóðskan er eisini av sama góða slag sum tann í Foinaven oljufeltinum.

- At úrslitið er vánaligt kunnu vit skjótt blíva samd um. Vit funnu ikki lønandi oljufelt men fingu prógv fyri, her finnast øki, sum olja kann í vera sigur Hjarnar Djurhuus, sum vísir á, at teir nú hava seismikkin og veruleikan at halda seg til. -Tey gera teg betri føran fyri at leita framyvir. Tú fær so eisini upplýsingar frá øðrum, sum bora. So samanumtikið er man nógv betri fyri seinni at meta um økið og taka støðu til, hvat tú skal gera. Og tess fleiri hol tú borar tess betri møguleiki er at avmarka økið og finna olju.

BP hevur bundið seg til at bora tríggjar brunnar. Tað verður ikki tikið støða til næsta brunnin fyrr enn alt tilfarið er kannað til botns. Tað verður neyvan her og nú. Talan er um dýrt keypta vitan, sum nú skal arbeiðast. Brunnurin hevur kostað einar 200 mill. kr., og tað eru kanska einar 50 mill. kr. meira enn upprunaliga mett. Shell er eisini við í hesum loyvinum og kemur at bera sín part av útreiðslunum.

Hjarnar Djurhuus sigur annars, at tá hugsað verður um teir umleið 100 brunnarnar, sum vórðu boraðir vestan fyri Hetland, áðrenn lønandi fund vórðu gjørd, so má siga, at vit eru kanska í so krevjandi at rokna við fundum beinanvegin. -Tað var kanska "geilað" ov nógv upp, at fyrstu ferð borur varð settur í skuldi tað vera jackpot.

Nú verður so farið um markið við West Navion at bora ein nýggjan brunn fyri BP og Shell í bretskum øki, og Hjarnar Djurhuus dylur ikki fyri, at úrlitið av tí boringini kann ávirka støðuna á føroyaøkinum.

## Statoil leitibrunnur 6005/15-1

1. september steðgaði boripallurin Sovereign Explorer boringini av brunni 6005/15-1 í loyvi 003 hjá Statoil samtakinum.

Úrslitini frá boringini vísa, at brunnurin inniheldur ein farra av kolvetni, men ongar størri nøgdir. Nærmastu dagarnar skulu royndir takast og ymsar mátingar gerast í brunninum, áðrenn hann verður læstur. Rúgvismikla tilfarið verður komandi mánaðarnar neyvari kannað, og verða úrslitini av stórum týdningi, tá framtíðar oljuleitingar skulu fyrireikast.

Brunnurin, sum er á 935 metra dýpi, røkkur 4.000 metrar niður undir sjóvarmálan, har hann endar í jarðløgum frá paleocen tíðini. Avgjørt varð at steðga boringini, tá komið varð í gosgrýti, eins og seismisku mátingarnar høvdu víst.

## BP leitibrunnur 6004/12-1

22. september steðgaði boriskipið West Navion leitiboringini í brunni 6004/12-1 í loyvi 004 hjá BP og Shell.

Boringin á Svínoy leitimiðnum náddi niður ígjøgnum fláirnar, ið vóru høvuðsmál í leitibrunninum, og hon staðfesti, at olja og gass finnast á økinum, hóast ikki í rakstrarverdum nøgdum á hesum stað. Úrslitið av boringini vísir, at Føroyaøkið inniheldur eina virkna kolvetnisskipan, og at tað finnast sandgrýtisfláir við góðum eginleikum at goyma olju og gass.

Brunnurin, sum er á 1.074 metra dýpi, røkkur 4.354 metrar niður undir sjóvarmálan, har hann endar í jarðløgum frá paleocen tíðini.

Boriarbeiðið hevur verið merkt av stórum trupulleikum í djúpara partinum av brunninum. Hóast hetta eydnaðist tað at gera eina røð av mátingum og taka grótroyndir í dýpinum, áðrenn gjørt varð av at steðga boringini.

# Marjun hjá Hess er favoritturin

**Hóast tað er eitt vónbrot, at hvørki Statoil ella BP funnu lønandi oljufelt í fyrstu boringum sínum so heldur norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang tó, at prógvini um eina virkna oljuskipan eiga at geva vónir. Hann dylur ikki yvir, at Marjunbrunnurin hjá Amerada Hess samtakinum alla tíðina hevur verið hansara favorittur**



*Terje Hagevang heldur orsøk er til bjartskygni, hóast tvær miseydnaðar boringar. Her er hann saman við Eyðun Elttør, oljumálaráðharra á oljuráðstevnu í Stavanger um tað mundið, tá Saga Petroleum hevði góðar dagar.*

*Mynd jan*

OLJULEITING
*Jan Müller*

- Sjálvandi er ein vónsvíkin, tí man hevði jú vónað, at hetta varð eitt lønandi fund, men øll orsøk er kortini til ikki at vera vónsvikin, tí olja er staðfest - um ikki í lønandi mongdum. Har eru eisini staðfestar sandgrýtisfláir, og tað gevur okkum vón um, at tað er møguleiki at finna lønandi oljufelt á føroyska landgrunninum sigur norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang, sum hevur arbeitt við føroysku undirgrundini í nógv ár. Hann var leitistjóri hjá fyrrverandi norska oljufelagnum Saga, sum í fleiri ár gjørdi umfatandi kanningar av føroysku undirgrundini.

Terje Hagevang sigur seg ikki vita, hvat Statoil fann í sínum brunni, men eftir tíðindaskrivinum nú um BP brunnin at døma er tað fyri fyrstu ferð váttað, at tað finnast sandgrýtisfláir við olju. Funnust hesar ikki kundu føroyingar nevniliga gloymt alt um olju við Føroyar.

Terje Hagevang heldur, at tað er sera áhugavert at hoyra, at tað nú er prógvað, at tað finst ein virkin oljuskipan í føroyska økinum tvs. at tað er prógvað, at her er eitt keldugrótslag, sum hevur kunnað framleitt olju.

Norski jarðfrøðingurin, sum hevur fylgt væl í gongdini á Atlantsmótinum og her ikki minst í økjunum, har olja er funnin vestan fyri Hetland heldur, at tað er ikki ómøguligt, at tað, sum hendi, tá oljufeltið Foinaven varð funnið, kann endurtaka seg á føroyskum øki.

Søgan er nevniliga tann, at tá fyrsta lønandi oljufeltið Foinaven varð funnið fyrst í 90-unum varð ikki rakt við nevniverdugar mongdir av olju í tí fyrsta brunninum. Olja varð funnin í sandi frá paleocen-tíðini, men hann var tunnur og oljulagið somuleiðis. Hildið varð tó, at her vóru møguleikar og arbeitt varð tí meira við seismikkinum og jarðfrøðini aftaná fyrstu boringina fyri at gera sær eina betri mynd av staðnum. Umleið eitt ár seinni varð ein nýggjur brunnur boraður og Foinaven feltið varð loksins funnið. Tað var so eisini BP, sum stóð fyri tí. Terje Hagevang heldur, at í besta fall er tað henda sama gongd vit nú uppliva í Føroyum. Men sum ein, ið hóast alt stendur á síðulinjuni og eygleiðir gongdina, vil hann tó ikki gera seg so fullklókan uppá tað. Svarið mugu vit fáa frá BP fólki.

Eftir vánaliga úrslitið av Statoilboringini herfyri úttalaði sami Terje Hagevang seg til Sosialin og metti hann, at ein av teimum trimum boringunum í ár átti at geva úrslit. –Sjálvandi kanst tú einki siga við vissu, men hagtalsliga sæð eigur triði hvør brunnur í Gullhorninum at verða eitt lønandi fund, so nú mugu vit so seta vónirnar til brunnin hjá Amerada Hess samtakinum sigur hann.

- Alle gode gange tre. Eg haldi hetta sær sera lovandi út fyri Amerada Hess, og tá eg nú fái spurningin, hvør av teimum trimum brunnunum, sum eru og verða boraðir í ár, er tann mest lovandi, so hevur tann hjá Hess alla tíðina verið mín favorittur. –Eg verði tí ikki kløkkur verður olja funnin har.

Terje Hagevang sigur víðari, at hóast Gullhornið er eitt lovandi øki, so er tað meira komplext enn onkur man halda. Tað er ikki bara at sammeta tað við Foinaven og Schiehallion og so halda, at allar súðir eru syftar. Her krevst eitt stórt leitiarbeiði.

- Men verður als einki lønandi fund gjørt í hesum umfarinum eiga vit so avgjørt ikki at avskriva hvørki Gullhornið ella aðrar partar av landgrunninum. Tí hetta vóru góð tíðindi hóast alt. Terje Hagevang heldur, at fleiri áhugaverd øki eru inni á føroyska landgrunninum longur norður vit koma. Tí setir hann eisini stórar vónir til eitt nú boringarnar hjá Texaco á bretsku síðuni, sum helst verða í næsta ár. Tær kunnu eisini geva góðar ábendingar um, hvørji øki eru skilagóð at hava við í næstu útbjóðing.